# Arbeiðið upp á ferjuleguna í Trongisvági má leggjast um

**Koyringin av gróti verður ikki tikin uppaftur fyrrenn nakað út í mars mánaða, men tað er framvegis ætlanin, at nýggi Smyril skal sleppa til bryggju fyrst í november**

FERJULEGA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Arbeiðið upp á ferjuleguna í Trongisvági má nú umskipast.
Tað verður neyðugt eftir at øll koyringin við gróti til molan á ferjuleguni mátti halda uppat.
Koyringin mátti halda uppat tí at ivi hevur tikið seg upp um, hvussu nógv grót, Landsverkfrøðingurin hevur loyvi at taka til endamálið.

Tá ið Landsverkfrøðingurin fekk loyvi at gera grótbrot Inni í Líð í Trongisvági, var treytin frá friðingarmyndugleikanum, at hann skuldi halda seg innanfyri eina ávísa linju.

Men nú hevur ivi tikið seg upp um, hvar hendan linjan er.

Landsverkfrøðingurin sigur, at tað vóru bara nøkur punkt sett upp, men at ongin linja varð gjørd.

Og nú er sprongt so langt, sum teir halda er ráðiligt.

Firðingarnevndin í Suðuroy hevur kannað viðurskiftini og er komin eftir, at loyvt er at sprongja enn longri suður.

Men fyri at ongin ivi skal taka seg upp, skal málið nú viðgerast í yvirfriðingarnevndini og hon hevur ikki fund, fyrrenn mitt í mars og fyrrenn tá verður koyringin av gróti til molan ikki tikin uppaftur.

– Umsóknin um at taka grót hevur ikki verið nóg greið og nóg fullfíggjað, sigur landsverkfrøðingurin.


*Ætlanin er framvegis, at nýggi Smyril skal sleppa til bryggju í Trongisvági, tá ið hann kemur, men molin verður ikki liðugur*

### Umskipa arbeiðið

Tað er byggifelagið Articon, sum ger arbeiðið og mikudagin var fundur ímillum Articon og Landsverkfrøðingin um støðuna. Jákup Enni, sum er arbeiðsleiðari hjá felagnum í Trongisvági, sigur, at nú verður neyðugt at umskipa arbeiðið.

Hann sigur, at sum støðan er, má koyringin av gróti til molan bíða eftir yvirfriðingarnevndini, tó kunnu teir kanska byrja nakrar dagar, áðrenn hon hevur fund við at koyra grót sum liggur.

Annars má arbeiðið leggjast um, so at teir nú fara at framskunda arbeiðið upp á sjálva ferjuleguna.

Grót, sum er sprongt í grótbrotinum, verður so brúkt til tað.

Jákup Enni sigur, at tað er framvegis ætlanin at sjálv ferjulegan skal vera liðug fyrst í november, so at nýggi Smyril fær lagt at, tá ið hann kemur.

Men sum støðan er nú, kann ikki væntast, at molin verður liðugur, so tí má koyrast við gróti eftir at Smyril er komin.

Men skuldi tað hent, at yvirfriðingarnevndin ikki er samd við friðingarnevndini í Suðuroy, so at teir ikki sleppa at sprongja meir?

– Ja, so fyriliggur ein nýggj støða, sum má takast upp tá, sigur Jákup Enni.

Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur, segði við Sosialin í gjár, at so má grót fáast til vega onkra aðrastaðni frá.

Enn manglar 50 metrar í at fáa molan lidnan. Av gróti verður brúk fyri 150.000 rúmmetrum afturat, men verður linjan løgd soleiðis, sum Landsverkfrøðingurin vónar at fáa viðhald fyri í yvirfriðingarnevndini, verður nóg mikið av gróti.

# Fjarhiti frá brennistøðini skal brúkast í Leirvík

**Hitarør verða neyvan løgd ígjøgnum norðoyatunnilin so at avlopshitin av brennistøðini í Leirvík kunnu brúkast í Klaksvík.Tingmenn úr fleiri flokkum halda, at tað er rættast at brúka avlopshitan á staðnum**

FJARHITI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Fjarhitin frá brennistøðini í Lorvík skal brúkast í Lorvík.

Í hvussu so er, verður tað ikki við almennum pengum.

Tað má verða niðurstøðan eftir at løgtingið umrøddi spurningin á tingi í gjár.

Torbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, spurdi løgmann um ætlanina at leggja hitarør ígjøgnum Norðoyatunnilin og at brúka avlopshita í Klaksvík.

Løgmaður svaraði, at ein bólkur, sum hevði kannað málið, var komin eftir, at tað loysti seg ikki. Tó mælti bólkurin, at umhugsa at gera eina grøv ígjøgnum tunnilin, so at rør kundu leggjast seinni, skuldi tað verið.

Men tað er eisini ivingarsamt, um tað verður av nøkrum.

Fleiri politikarar úr ymsum flokkum vístu á, at tað var rættast at brúka fjarhitan frá brennistøðini til onkur endamál nærhendis brennistøðini sjálvari.

Ì hesum sambandi varð víst á, at Høvdavirkið brúkti avlopshita frá brennistøðini og ætlanir vóru um útbyggingar, so at tilsamans skuldi virki rundanum brennistøðina brúka eini 80% av hitanum frá brennistøðini.

### Orkan skal brúkast á staðnum

Kristian Magnussen úr javnaðarflokkinum vísti á, at IRF og brennistøðin í Havn stóðu fyri stórum avbjóðingum við at reinsa roykin frá støðunum.

Samstundis eru brennistøðirnar við at eldast. Hann mælti heldur til at vit bygdu eina stóra brennistøð fyri alt landið í miðstaðarøkinum, tí ein stór støð gevur nógv meiri orku enn tvær smærri, og so varð avlopshitin brúktur til hús í Havn í sambandi við Fjarhitafelagið, sum longu er í høvuðsstaðnum.

Eisini Jákup Mikkelsen úr fólkaflokkinum helt, at tað átti at kannast um tað ikki var skilabetri at gera eina stóra brennistøð.

John Johannesen úr javnaðarflokkinum vísti á, at í hesum sambandi var ikki bara talan um orkupolitikk, men um yvirskipaðan umhvørvispolitikk, sum landið eigur at taka støðu til ístaðin fyri at tveita myndugleikin upp í hendurnar á kommunalum felagsskapum.

Og brennistøðirnar kunnu eisini brúkast til at at útvega hita, tær kunnu eisini brúkast til at framleiða elorku við. Tað snýr seg um at orða ein yvirskipaðan orku- og umhvørvispolitikk.

Bæði Jóannes Eidesgaard úr javnaðarflokkinum og Torbjørn Jacobsen tóku undir við at vit orðaðu ein yvirskipaðan orku- og umhvørvispolitikk.

Kjartan Joensen úr fólkaflokkinum upplýsti, at næstan helvtin av avlopshitanum frá brennistøðini verður brúktur. Tað er stórt byggilendi rundanum brennistøðina og verða fleiri virki bygt rundanum har, er øll orkan brúkt. Tí er tað at tveita pening burtur at leggja rør ella grava grøv ígjøgnum Norðoyatunnilin.

– Tað ber eisini til hjá klaksvíkingum at byggja virki í Leirvík.

Andrias Petersen úr javnaðarflokkinum helt, at tað kom at ganga nógv ár, áðrenn tað ver at loysa seg at leggja fjarðhitarør langar leiðir og vísti á royndirnar úr Hoyvíkshaganum, har allir oljugrunnurin hjá landinum varð tømdur fyri at bjarga fjarhitafelagnum.

Hann tók undir við, at avlopshiti frá brennistøðini varð brúktur til ídnaðarendamál undir liðini á brennistøðini til orkukrevjandi ídnað á staðnum.

Páll á Reynatúgvu úr tjóðveldisflokkinum helt eisini at tað var rætt at kanna um tað ikki var rættast at gera eina stóra brennistøð fyri at fáa raksturin so effektivan sum gjørligt.

Tórbjørn Jacobsen segði at tað má verða sjálvsagt, at økið rundanum brennistøðina verður brúkt til eitt ídnaðarøki, har virkini kunnu brúka avlopshita, ístaðin fyri at leggja rør ígjøgnum undirsjóvartunnilin.

Jóannes Eidessgaard helt at tað kundi verið vert at umhugsa at lagt grøv ígjøgnum undirsjóvartunnilin til at leggja rør og kaðalar ígjøgnum, tí tað var vanligt aðrastaðni, tí ongin visti, hvørjir møguleikar tóku seg upp í framtíðini.

Tó var hann samdur í, at vit fingu mest burturúr at brúka avlopshitan frá brennistøðini við at brúka hann á staðnum.



# Nýggjur kuningarleiðari í Vágum

**Felagið Vágar hevur sett nýggjan kunningarleiðara, eftir at Terji Nielsen fór úr starvi fyrr í mánaðinum**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*


*Anna Sofía Nordendahl, í miðuni, tekur við sum kunningarleiðari eftir Terja Nilsen, v.m. Astrid Berglíð, h.m., er eisini í starvi hjá Kunningarstovuni í Vágum*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Vágar:** Anna Sofía Nordendahl er sett sum leiðari fyri Kunningarstovuna hjá Felagnum Vágar í Miðvági. Hon tekur við eftir Terja Nielsen. Anna Sofía Nordendahl er ikki ókend í vinnuni. Hon hevur í sjey ár starvast á Kunningrsotvuni í Vágum, sum tó ikki hevur verið so virkin og skipað soleiðis, sum hon er í dag, nú fleri fólk eru til arbeiðis bæði á sjálvari Kunningarstovuni og við Kunningardiskin á flogvøllinum.

Niels Olgar Joensen, formaður í felagnum Vágar, sigur, at tey fara at miða eftir at fáa ein avloysara aftur at tí halvumøðrum starvinum, sum er í løtuni. Hesin avloysarin skal so taka við eftir tørvi, sigur hann.

Virksemið hjá Kunningarstovuni verður á leið, sum tað hevur verið frammanundan. Tó er ein nýggjur faldari á veg, sum er eitt sindur øðrvísi, enn teir undanfarnu hava verið.

Í nýggja faldaranum verður umframt teir túrar og støð, ið eru at síggja og vitja í Vágum, eisini ein partur, har lýst verður við, hvørjir handlar eru í oynni, og hvat teir hava at selja.

Fýra síður verða settar av til handlarnar, sigur Niels Olgar Joensen. Har verður so kort yvir bygdirnar, har ásett er, hvar handlarnir liggja.

Hetta er sum vera man serliga ætlað fremmandafólki, sum kemur í Vágar, sigur Niels Olgar Joensen. Fólk, sum til dømis sita á flogvøllinum og bíða, kunnu so stytta sær stundir við at vitja handlarnar, sum eru í oynni, sigur hann.

# Føstulávintstiltak á Giljanesi

**Lions Club í Vágum skpar sunnudagin fyri árliga føstulávintstiltakinum í ítróttarhøllini á Giljanesi. Ágóðin av tiltakinum verður brúktur til at endurreisa minnisvarðan í Mykinesi fyri**

INNSAVNAN
*Edvard Joensen*


*Ágóðin av føstulávintstiltakinum hjá Lions Club í Vágum í ár fer til at endurreisa minnisvarðan í Mykinesi*

**Vágar:** Árliga aturvendandi Giljanestiltakið hjá Lions Club í Vágum verður hildið sunnudagin í føstuinngangi.

Vanligu tiltøkini, sum plaga at vera á slíkum tiltøkum, verða eisini við hesaferð. So sum eydnuhjól, lutaseðlasøla, fiskibrunnur og slíkt, sum fólk kunnu royna. Vinningarnir í eydnuhjólinum eru millum aðrar slíkt, sum limirnir í Lions sjálvir hava gjørt.

Lions í Vágum plagar hvørt ár at prenta lutaseðlar, sum verða seldir undan og undir sjálvum tiltakinum á Giljanesi. Soleiðis er eisini í ár.

Eitt nýtt tiltk hesaferð verður ein konsert, sum verður klokkan 20.00 sunnukvøldið. Ikki tað, at konsertir og slíkar framførslur ikki hava verið, men hesaferð verða tað Lionsmenn sjálvir sum fara at syngja. Eitt mannskór hava teir sett upp og hava vant nakrar sangir til júst hetta tiltakið.

Regin Poulsen, forseti í Lions Club Vágar, setir tiltakið seinnapartin klokkan 16.00. Eydnuhjólið byrjar klokkan 17.00, og lutaseðlarnir verða drignir, tá tiltakið endar klokkan 23.00.

# Maersk flogfør skifta lit

**Nýggi flotin hjá Maersk Air fer at skifta lit, soleiðis at tann kendi ljósabláí liturin ikki verður so einaráðandi**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*



*Nýggju Boeing 737-700 flogførini há Maersk Air skulu øll skifta lit. Tey fara tó ikki at flúgva til Føroya*

Nýggja søluherferðin hjá Maersk Air fer nú eisini at síggjast aftur í litunum á nýggju flogførunum. Ljósabláí liturin verður í stóran mun skiftur út við hvítt og myrkablátt.

Tað er i samband við nýggja átakið hjá Maersk Air, at hendan broytingin veðru gjørd, sigur Per Brinch, kunningarstjóri hjá Maersk Air. Nógv verður gjørt burtur úr at lýsa rutur og slíkt, og tí verður eisini mett, at eygað skal hava sítt, sigur hann.

Nýggja konseptið umfatar rutur suður í Europa, og ikki Føroyarutuna. Tí verða tað í fyrsta umfari bert tey nýggju Boeing 737-700 flogførini, sum flúgva á heusm rutunum supureftir, sum verða málað við nýggju litunum.

Flogførini, sum flúgva til Føroya, eru av slagnum Boeing 737-500 og verða ikki málað í fyrsta umfari, sigur Per Brinch.

Hann sigur, eyðkenda stjørnan í búmerkinum hjá A.P. Møller sjálvandi verður at síggja á flogførunum eisini eftir, at tey hava skift lit.

Fyrsta flogfarið við nýggju litunum varð sýnt fram í Kastrup mikumorgunin.